## Orka fyrr og nú

Í Savnsfagnaðinum í heystfrítíðini og vikuna eftir fer Føroya Fornminnissavn at vísa, hvørjar orkukeldur hava verið brúktar gjøgnum tíðirnar. Ymsastaðni í forvitnisliga savninum eru smáar framsýningar settar upp, sum vísa, hvussu hiti, flutningur og ljós hava broytt seg frá gomlum døgum til dagin í dag. Savnið er í sambandi við Savnsfagnaðin í heystfrítíðini opið millum kl. 11 og 16 frá mánadegnum 12. oktober til fríggjadagin 16. oktober. Tað er ókeypis at koma inn hesar dagarnar.



## Vit eta meira frukt

Ein uppgerð hjá Hagstovuni vísir, at føroyingar nú eta meira frukt enn kjøt. Roknað upp á árið innfluttu føroyingar í 2003 50 kilo av kjøti fyri hvønn íbúgva, meðan innflutningurin av frukt var 47 kilo fyri hvønn íbúgva. Í fjør vóru tølini ávíkavist 59 kilo av frukt og 51 kilo av kjøti fyri hvønn íbúgva um árið. Hagstovan skrivar á heimasíðuni, at ein orsøk til broytingina helst er heilsuátakið í 2004, har skúlar, abreiðspláss, barnagarðar og onnur vórðu eggjað at seta meira frukt á matarborðið.

# DR betalir fyri at varpa stuðulssendingar

**Tá Danmarks Radio varpar út frá árligu landsinnsavningini í Danmark, sum 12 teir størstu hjálparfelagsskapirnir í Danmark skipa fyri, er tað DR, sum má gjalda fyri at vera við**



*Tá Danmarks Radio sendir frá Danmarks Indsamling, sum verður fyriskipað av 12 teimum størstu hjálparfelagsskapunum í Danmark, er tað DR, sum má gjalda fyri at varpa tiltakið út. Tað sama er ikki galdandi í Føroyum*

*mynd: Bjarne Bergius Hermansen, DR*

STUÐULSSENDINGAR

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Fyrradagin skrivaði Sosialurin, at tá Krabbameinsfelagið tann 31. oktober fer at hava landsinnsavningina »Føroyar móti krabba«, er tað móti einum gjaldi á 330.000 krónur fyri at fáa Kringvarp Føroya at vera við í innsavningini.

Hetta gjaldið er sambært Anniku Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóra, til at dekka allar tær eksternu útreiðslurnar, sum standast av at framleiða tilfar og at fyriskipa sendingina.

Árliga er stóribróður Kringvarpsins í Danmark, Danmarks Radio, eisini við í eini árligari landsinnsavning, sum 12 teir størstu hjálparfelagsskapirnir skipa fyri, »Danmarks Indsamling«.

Tá Sosialurin spurdi seg fyri í Danmarks Radio, um og í tí føri hvussu nógv teir taka fyri at vera við í tiltakinum, svaraði Carl Otto Dethlefsen, sum er Udviklingsredaktør í Danmarks Radio, at »DR ikki krevur pengar fyri at gera árliga innsavningartiltakið – DR betalir fyri at fáa loyvi at varpa tiltakið, sum formelt verður fyriskipað av teimum 12 luttakandi hjálparfelagsskapunum«.

Hetta er tó ikki førið í Føroyum, har Jákup N. Olsen, formaður í Føroya felag móti Krabbameini, váttar, at tey máttu gjalda 330.000 krónur, skuldu tey fáa Kringvarp Føroya at taka lut í innsavningini, og at tað mátti nevndin samtykkja, skuldu tey koma víðari við innsavningini.



*Peter Jensen er formaður í grønlendska kringvarpsstýrinum*

*Mynd: KNR*

# Ætlar at savna allar fjølmiðlarnar undir einum taki

**Nýggi formaðurin í grønlendska kringvarpsstýrinum arbeiðir við einari hugvekjandi ætlan**

FJØLMIÐLAR

*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Herfyri varð Peter Jensen valdur til formann í stýrinum fyri grønlendska kringvarpið KNR. Í gjár hevði hann fund við starvsfólkið í kringvarpinum, og har kunnaði hann tey um eina ætlan, sum má sigast at vera bæði slóðbrótandi og hugvekjandi.

Gongst sum formaðurin ætlar, verða tað almenna kringvarpið KNR, tað privata sjónvarpið Nuuk TV, bløðini AG og Sermitsiaq og aðrir miðlar savnaðir undir einum taki. Høvuðsendamálið er at spara, tí við at húsast undir sama taki kundu teir ymsu miðlarnir spart munandi til umsiting. Eitt nú kundu teir hava felags móttøku og felags bókhald, samstundis sum miðlarnir kundu verið felags um ymisk viðurskifti.

Peter Jensen sigur við heimasíðuna hjá grønlendska kringvarpinum, at sjálvandi skulu teir einstøku miðlarnir varðveita sítt redaktionella frælsi, hóast teir eru undir somu lon. Hann sigur, at bæði bløðini og sjónvarpið í Nuuk hava víst hugskoti hansara áhuga.

Annars ætlar tann nýggi stýrisformaðurin sær at virka fyri, at tað almenna kringvarpið verður skipað sum ein vinnurekandi grunnur.